# Beckham aftur á landsliðnum

Avrikini hjá David Beckham í AC Milan hava verið so góð seinastu vikurnar, at enski landsliðsvenjarin Fabio Capello hevur sent boð eftir Beckham til landsdystin ímóti Spania mikudagin. - Beckham sær út til verða í góðum formi, og hann spælir betur nú, enn hann gjørdi fyri einum hálvum ári síðani, sigur Fabio Capello við Skysports.



# LA Galaxay krevur nógvar pengar

David Beckham hevur eftir øllum at døma hug at skifta til AC Milan at spæla. Í løtuni leigar AC Milan Beckham frá amerikanska felagnum LA Galaxy. Í USA ætla tey ikki at lata Beckham fara uttan víðari, og har hava tey longu víst einum tilboði frá sær. Líkt er til, at AC Milan er sinnað at gjalda einar 100 milliónir krónur fyri at fáa Beckham at halda fram í felagnum.

# í myndum



Kristina Griksaite stóð ein branddyst í málinum. Serliga var tað henni at takka, at Stjørnan ikki misti takið á dystinum fyrstu løtuna
Mynd: Álvur Haraldsen



Una Olsen hevur roynt leiklutin fyrr, men fyri tað er stuttleikin við at taka móti steypinum ikki minni
Mynd: Álvur Haraldsen



Fagnaðurin var sjálvandi ovurstórur á spælarunum eftir dystin, og so mátti tað vera harvið, at eingin sjampanju-fløska slapp í nær námind hallargólvinum
Mynd: Álvur Haraldsen

# Ov fáar royndir

**Vónbrotið var stórt hjá Tjaldri eftir taptu finaluna, men nú verður fokus sett á landskappingina**

**HONDBÓLTUR**

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

**Guðrun í Lágabø er ein av fáu spælarunum hjá Tjaldri, sum hevði spælt finaludyst undan leygardegnum.**

**Hetta var triðja ferðin, at hon stóð sum tapari av dystinum, og vónbrotið var sera stórt, tá heiðursmerkini vórðu handað.**

**- Hetta var sjálvandi ikki meiningin. Vit ætlaðu sjálvandi at vinna, men tað skuldi bara ikki ganga í dag.**

***Hvør var orsøkin?***

**- Tær hava kanska breiðari og royndari hóp, enn vit hava. Og tá tær mansverja megna aðrar á okkara liði ikki í nóg stóran mun at taka yvir. Og so er tað sjálvandi eisini ein smeitur fyri okkum, at Annika noyðist av vøllinum. Hon hevur sera nógv at siga fyri okkum, og kanska var júst tað avgerandi løtan í dystinum, sigur Guðrun í Lágabø.**

***Men steypakappingin er ikki einasta kappingin á skránni. Er tað landskappingin, sum fær tykkara fokus nú?***

**- Tað verður tað sjálvandi. Okkara partur skal so ikki liggja eftir, og klára vit at koma í eina finalu afturat, ætla vit sjálvandi at vinna hana, sigur Guðrun í Lágabø.**